# Skrivstovustarv í Fótbóltssambandi Føroya

Eitt skrivstovustarv í Fótbóltssambandinum verður við hesum lýst leyst til setan 1. juli 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Møgulig málsøki:**
- skrivstovan
- journalisering og skjalagoymsla
- Skráseting av úrslitum v.m.
- Dagføring og møgulig ábyrgd av heimasíðu FSF's

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- kunnleika til føroyskan fótbólt
- kunnleika til fyrisiting
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- kunnleika til brúk av teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi sjálvstøðugt starv. Lønin verður eftir nærri avtalu.

**Umsóknir:**
Umsókn við møguligum upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

**Fótbóltssamband Føroya**
**Postrúm 3028, 110 Tórshavn**

Umsóknirnar skulu vera Fótbóltssambandinum í hendi seinast 20. juni 2005.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ísak Mikladal, aðalskrivara, tlf. 211988.

# KRINGVARP FØROYA

## Programmteknikari

Søkt verður eftir útvarpsteknikara at seta skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Tann, sum settur verður, skal arbeiða á teknisku deild í útvarpinum. Arbeiðið fevnir m.a. um sendivaktir og framleiðsluvaktir. Góð 60% av senditíðini hjá útvarpinum er uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Gott innlit í ljóðtøkni
- Hollar royndir innan útvarpstøkni
- Duga at arbeiða við ljóði á teldu
- Hollan teldukunnleika. Vit leggja serligan dent á, at tú dugir Windows stýriskipanir

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi og áhugavert arbeiði, har tú støðugt hevur møguleika fyri persónligari menning, og sleppur at brúka tíni skapandi evni
- Eitt arbeiði við sera skjótari tøkniligari menning
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði, har tú í stóran mun hevur ávirkan á úrslitið

**Vit ynskja:**
- At tær dámar at arbeiða í skiftandi vaktum, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í bólki
- At tú dugir at loysa trupulleikar, tá ið á stendur
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann koma við mennandi og góðum íkasti til deildina
- At tær dámar at skapa nakað sjálv/ur
- At tú hevur hegni at brúka tónleik í tínum arbeiði
- At tú hevur kunnleika til tónleikaframleiðslu
- At tú dugir at síggja fyrimunir/loysnir fram um forðingar/trupulleikar
- At tú hevur stóra koyrikortið

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Umsóknir skulu vera Kringvarp Føroya í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. juni kl. 12.00.

Stílið umsóknina til: Kringvarp Føroya, Norðara Ringvegi, Postboks 328, 110 Tórshavn ella sum teldupost til *haj@uf.fo*

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til
Hans Andor Johannesen,
deildarleiðara,
telefon 342000.



*Lagaligar løtur vóru ikki nógvar hjá einum manni sum var mynstraður yvir 300 dagar um árið í eitt 15 ára skeið frá 1958 til 1964. Her er ein mynd á trolaradekki og ein á ferð uttanlands saman við konuni.*

# Myndir til ævisøguna um Kaj

Onnur bókin, í ævisøguni um Kaj Johannesen úr Hvannasundi, verður nú skrivað, og kemur, um alt gongur eftir vild, út í heyst. Hon fer serliga at snúgva seg um krígsárini við Skálabergi og Nærabergi. Tíðina umborð á Dragabergi, Sjúrðarbergi og týska Skálabergi.

Í hesum sambandi sóknast høvundurin eftir myndum frá ævisketiði hansara. Í fyrstu atløgu hava allar myndir, sum hava nakað við virki og lív hansara áhuga. Tað verið seg myndir umborð á skipi, ikki bara myndir av Kaj, men eisini av lívinum umborð. Myndir av monnum, sum sigldu við Kaj hava áhuga og eisini myndir umborð á trolarum, sum brøður hansara førdu. Eg havi eisini áhuga fyri myndum tiknum umborð á øðrum trolarum, av føroyskum trolarum undir fiskiskapi. Gerandismyndir av arbeiðsgevaranum hjá Kaj, J. F. Kjølbro, hava stóran áhuga.

Liggja tit inni við slíkum myndum, so hevði eg verið ógvuliga fegin, um tit settu tykkum í samband við meg.

**vinarliga**
Jústinus Leivsson Eidesgaard,
*rithøvundur*

**KAJ2**

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík

FØROYAPRENT · TEL. 314 555



# KOYRISKÚLIN Í MIÐBÝNUM

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar mikudagin 15. juni 2005 kl. 19.00

Avgreiðir øll koyrikort

**NIELS P. OLSEN**
TEL 31 00 10 · FARTEL 22 30 41

**BJARKI JOHANNESEN**
TEL 31 48 45 · FARTEL 21 48 45

**ÓLAVUR ARGE**
TEL 31 40 02 · FARTEL 21 40 02

**MARNAR ANDREASEN**
TEL 31 43 81 · FARTEL 21 43 81

Sosialurin 341800

**Sosialin**
-so eru tit við!